## Hart skiftir felag

Málmaðurin Joe Hart fer nú helst úr Manchester City til okkurt annað felag at spæla í eina tíð. City hevur keypt írska landsliðsmálmannin Shay Given, og tí sleppur Joe Hart ikki á liðið í City. Nú sigur felagið, at tað er sinnað at leigað tann evnaríka málmannin út til okkurt annað felag í Onglandi. Tað sigst, at uppflytararnir í Birmingham eru áhugaðir at fáa Hart í sín part.



## Toppskjútti vil til Onglands

Bordeaux vann farna kappingarár franska meistaraheitið, og tað var millum annað takka veri málunum hjá álopsspælaranum Marouane Chamakh, sum er ættaður úr Marokko. Nú sigur Chamakh, at hann vil sleppa til Onglands at spæla. Og áhugi er eisini til staðar í Onglandi, tí Arsenal fer møguliga at taka kekkheftið fram. Prísurin fyri Chamakh er helst einar hundrað milliónir krónur.

NSÍ-EB/Streymur 1-2 (0-1):

# Punkteraður stevnuhýrur

*NSÍ*

*EB/Streymur*

**Tá EB/Streymur eitt lítið korter í seinna hálvleik legði seg á odda 2-0, líktist dysturin við Løkin einum avgjørdum dysti. NSÍ royndi at trýsta seg innaftur, men skapti ov lítið til veruliga at fáa hótt gestirnar**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Tveir stríðsmenn á hvør sínum miðvølli: Bárður Olsen hjá EB/Streymi og Høgni Madsen hjá NSÍ*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

Tey bæði liðini, sum møttust í Eystanstevnudystinum við Løkin leygarkvøldið, høvdu bæði brúk fyri at reisa seg aftur eftir tap í mikudagsdystum. NSÍ mátti vinna, tí har snúði tað seg um plássið í oddastríðnum, meðan EB/Streymur ikki mátti tapa fyri triðju ferð á rað.

NSÍ byrjaði betur, men hevði ilt við at definera sítt álopsspæl. Hetta var fyrst og fremst Sorin Anghel fyri at takka, tí hann var allan dystin á tamb ein brandur í verjuni hjá EB/Streymi, og serliga væl lá fyri hjá honum at neutralisera toppskjúttan og gamla liðfelagan, Káроly Potemkin.

Nokk so skjótt fekk EB/Streymur vunnið sær eina yvirvág, ið serliga vísti seg í skjóta álopsspælinum, ið fleiri ferðir var rættiliga hóttandi – gjarna við sera beinleiðis spæli og uttan fleiri nertingar enn neyðugt.

Tá hetta so eisini gav gestunum eina 2-0 leiðslu tíðliga í seinna hálvleiki, kom tað sjálvandi at merkja dystin, sum í løtum var serstakliga undirhaldandi. Men sum fortreytirnar broyttust, gjørdist tað eisini í løtum ikki akkurát so polerað spæl, liðini vístu – og annars plaga at vísa í sínamillum dystunum.

### Legði upp til bæði

Ein hin mest eyðsýndi spælarin í álopspartinum hjá EB/Streymi var Hans Pauli Samuelsen, sum var við í uppspælinum til bæði málini og sjálvur skjeyt tað fyrra av teimum.

Tað kom hálvan tíma inn í dystin, tá hann sendi Arnbjørn Hansen avstað mitt fyri og sjálvur rann seg leysan í vinstru síðu. Arnbjørn fekk drigið tað mesta av NSÍ-verjuni til sín, áðrenn hann spældi Hans Paula, sum tá var blivin púra leysur og frá brotsteigarmarkinum sendi bóltin í málið við einum fantastiska góðum skoti, Meinhardt Joensen ikki kundi gera nakað við.

Eitt lítið korter inn í seinna hálvleik var Hans Pauli aftur upphav til mál, tá hann spældi stutt til Bárð Olsen, ið víðari spældi eitttvey saman við Brian Olsen og rann seg leysan, so hann í júst røttu løtuni fekk fatur á bóltinum innan fyri NSÍ-verjuna. Beint fyri nøsini á útstormandi NSÍ-málverjanum tveitti hann seg fram og prikaði bóltin í málið til 2-0.

Í veruleikanum var tað hetta seinna málið, ið fullkomuliga punkteraði dystin, tí hóast NSÍ royndi at leggja eitt massivt trýst á EB/Streym og langar løtur kringsetti brotsteigin hjá gestunum, lá illa fyri at fáa ítøkiligar málmøguleikar burturúr.

### Skaptu ov lítið

Nakrar ferðir leikaði tó hart á, og ta einu ferðina var skot frá Klæminti A. Olsen taklað í evstu løtu, eftir at Gunnar á Steig hevði bjargað roynd frá Potemkin. Eisini Einar T. Hansen hevði eina næska roynd, tá hann tamdi við bringuni og smekkaði til úr spískum, men dygst fram við málinum og út um aftaru stong.

Ikki fyrr enn í yvirtíðini eydnaðist NSÍ at fáa eitt brotsspark, tá Klæmint var koyrdur um koll, og Óli Hansen skoraði trygt. Men tíðin var skjótt úti, og EB/Streymur fekk sostatt øll trý stigini í pottin.

Fyri gestirnar var hetta ein kærkomin sigur ímóti einum av fremru liðunum, eftir at illa hevur ligið fyri hjá EB/Streymi tað mesta av árinum. Eystanstevna var í Runavík, so tí kendist tað kanska eyka fløvandi, at úrtøkan eisini gjørdist eitt íkast til steypaskápið við Margáir.

Tilsvarandi bakkast var tapið hjá NSÍ, sum higartil hevur verið ein av fremstu avbjóðarunum, men nú er dottið niður á fjórða plássið. Liðið hevur síðstu dystirnar mist bæði flog og hugflog, og er nú heili níggju stig frá oddasessinum.

## Vit vístu karakter

Einki var at siga til, at venjarin hjá EB/Streymi, Sigfríður Clementsen, var sera vælnøgdur eftir 2-1 sigurin á NSÍ leygarkvøldið.

– Hetta var øgiliga gott, tí vit hava í eina tíð ikki vunnið dystir, hóast vit hava spælt væl. Men í dag vístu vit karakter og bæði arbeiddu og bardust fyri sakini ímóti einum liði, sum vildi spæla við, segði hann.

– Vit eru ikki við í kappingini um meistaraheitið, men fegnast um, at vit nú vunnu ein dyst upp á tann rætta mátan.

Sigfríður hevur heldur hug at hyggja fram ímóti teimum komandi dystunum hjá EB/Streymi:

– Nú skulu vit mikukvøldið spæla ímóti Víkingi og síðani spæla europeiskar dystir, áðrenn steypafinalan er á skránni. Fyri okkum er umráðandi at fáa nøkur ting at rigga, nú vit nærkast hesum uppgávunum.

**hil**

## Torført at fáa flótandi spæl

– Vit gera tvey mistøk, sum merkja, at vit missa bóltin rímiliga aftarlaga á vøllinum, og tað ger, at teir fáa hasi bæði málini, staðfesti venjarin hjá NSÍ, Pauli Poulsen, eftir dystin við Løkin leygarkvøldið.

– Vit royna at spæla fótbólt ímóti einum liði, ið spælir langar bóltar í 90 minuttir, og tá er torført at fáa spælið at flóta.

NSÍ-venjarin var ikki so hugaður at tosa um málini fyri framman, men vísti bara á, at næsta málið er at vinna síðsta dystin fyri summarsteðgin, sum verður á Svangaskarði ímóti B68, ið júst hevur yvirhálað NSÍ. Tí verður grannauppgerðin hóskvøldið tann stóri dysturin um triðja plássið.

**hil**